## Bygdaráðsfundurin 06.09.2010

**Mál nr. 112/2010 Mentamál.**
J. nr. 2010-0023-0082
Í skrivi dagf. 16.08.2010 vísir Dánjal P. Højgaard, sum er ættaður úr Rituvík, á, at tað var ein varðagøta úr Rituvík heim á Nes, og at nakrir varðar standa av Nesi og yvir á Sand Mikla, meðan bert fáir standa uppi yvir til Rituvíkar.
Um áhugi er fyri at laða varðar upp aftur, so kann hann vísa á næmingar á Kambsdali, sum kundu gjørt hetta arbeiðið.
Prísurin er 100,00 kr. fyri at laða varðar upp aftur sum eru, og verða hesir lagaðir heilt av nýggjum er prísurin 500,00 kr. pr. varða.
Næmingarnir skulu námsferð seinast í september, so til ber at gera arbeiðið innan tað tíð.

Mentanarnevndin mælir til, at formaðurin í Mentanarnevdini kannar spurningin viðv. varðunum á varðagøtunum í kommununi og mælir til, at kommunan játtar upp til 10.000,00 kr. til at fáa laga varðarnar upp aftur.

Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini og at peningurin verður tikin av kto. nr. 549000 "stuðul til mentan".

Avgerð: Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtyt.

**Mál nr. 113/2010 Mentamál.**
J. nr. 2010-0024-0003

Í umsókn dagfest 19.08.2010 søkir Fyrireikingarbólkur fyri einum komandi Ungdómshúsið kommununa um fíggjarligan stuðul til ein fulltíðarleiðara fyri húsið, so hetta eisini kann vera opið um dagin til børn frá 3 flokki og uppeftir.
Annars verður húsið opið fyri teimum ungu 4 tímar um kvøldaranr, frá kl. 18,30 til 22,30 ella frá kl. 19 til 23.
Fyrireikingarbólkurin vil í øðrum lagi fáa at vita, hvussu stóra játtan kommunan vil veita Ungdómshúsinum.

Mentanarnevndin tekur undir við, at vit fáa eitt Ungdómshús á Toftum, og at kommunan stuðlar hesum arbeiðið við at rinda ein hálvtíðar settan leiðara til Ungdómshúsið. Hetta merkir, at Mentanarnevndin stuðlar Ungdómshúsinum til at hava opið fyri ungdóminum um kvøldarnar.

Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá Mentanarnevndini og stuðlar Ungdómshúsinum við 40.000,00 kr. sum løn til leiðara, í 2010, og taka av kto. nr. 157000 í ár, við teimum treytum:

- at ein nevnd verður sett fyri húsið.

- at ein rakstrarætlan verður gjørd.
- at ein reglugerð verður gjørd fyri húsið

Avgerð: Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 114/2010 Umhvørvismál.**
J. nr. 2010-0024-0004
Hin 25. juni 2010 søkir FcH, Føroya civila Hundaførarafelag, Nes kommuna um fríøkið, sum tey sum felag kunnu fáa loyvið til at nýta Til hundavenjing í Eysturoy.
Teimum tørvar eitt fast økið, sum kann nýtast til hundavenjing. Tað má vera eitt rímiliga slætt øki, sum kann hegnast inni. Økið má vera umleið á stødd við ein hálvan fótbóltsvøll.

Eisini verður søkt um økið, at nýta til "hundaskóg/garð". Ætlanin er, um loyvið verður givið til hetta, at prýða økið við nøkrum trøum og runnum, so tað bæði er innbjóðandi fyri hundum, eigarum og samstundis fríðkar um. Til hetta endamál eru allar støddir kærkomnar og tað er fyri so vítt líka mikið, hvussu knorslut tað er. Sum nú er finnast ongir "hundaskógir/garðar" í Føroyum og hundaeigarar nýta almenn fríøkir, sparki- og fótbóltsvøllar til endamálið. Hetta er ikki altíð so heppi.
Hesi bæði økini kunnu liggja hvør sær, men um økið er stórt nokk, kann man saktans hava tey við síðunar av hvørjum øðrum.

Er nakar møguleiki fyri, at Nes kommuna hevur fríøkið til annað av hesum ella bæði?

Tekniska nevnd viðgjørdi umsóknina og eftir at hava gjøgnumgingið tey fríøkir sum eru kommunal, staðfesti Tekniska nevnd, at onki hóskandi slætt øki á stødd við ein hálvan fótbóltsvøll er til tiltakið ”hundavenjingar” og heldur ikki eitt hóskandi óslætt øki til ”hundaskógir/garðar”.
Tann møguleikin sum Tekniska nevnd metir er fyri, at FcH kann fáa umbidnu ”venjingarøkir” og ”hundaskógir” er frá bóndrunum antin uttan- ella innanfyri bøgarðarnar.
Tekniska nevnd mælir tí til, at kommunan svarar FcH, at kommunan ikki hevur hóskandi støð at lata til FcH, til ætlaðu hundavenjingarnar, men at tey kunnu spyrja ein av bóndrunum, um teir eru sinnaðir til at lata FcH fáa umbidnu økir burtur av festunum.

Avgerð: Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 115/2010 Byggimál.**
J. nr. 2010-0042-0267
Hin 08.06.2010 søkir Snorri Jensen um byggiloyvi til bilhús sunnanfyri húsini. Eisini er ætlanin at fylla upp niðanfyri húsini soleiðis, at grasvøllurin verður javnur. Ætlanin er at fylla upp sunnanfyri húsini, í somu hædd sum grasvøllurin, og byggja bilhúsið fast í húsini. Tað kemur uml. 5 m oman um sethúsini. Bilhúsið verður á hædd við grundina á húsunum, 10 m langt og 5 m breitt.

Tekniska nevnd mælir til, at Tekniska deild kannar viðurskiftini viðv. bilhúsinum nærri.

Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt á bygdaráðsfundinum hin. 28.06.2010.

Málið var síðani viðgjørt og avgreitt á fundinum hjá Teknisku nevnd 09.07.2010, við tí heimild sum hon hevur í summarferiuni..

Avgerð: Tekniska nevnd mælir til, at Snorri Jensen fær byggiloyvi til bilhúsið, samb. innsendu tekning, og hetta verður lagt fyri bygdaráðið sum kunning.

Bygdaráðið tók hetta sum eina kunning.

**Mál nr. 118/2010 Byggimál.**
J. nr. 2010-0042-0272
Fyrispurningur er komin frá Føroya Tele, um loyvi til at byggja eina telestøð á matr. Nr. 474a, sunnanfyri útstykkingina við Lýarsveg, niðanfyri vegin.
Húsið er ein vanlig Telestøð og verður uml. 3x5 metur til støddar. Orsøkin fyri at teir ynskja at hava eina telestøð her, er tann at teir hava stóra "installatión" fram við hesum økinum, har ein høvuðslinja gongur frá Vikuni og niðan á Hamarsenda, og víðari til Rituvíkar og Æðuvíkar.

Tekniska nevnd mælir til at geva Føroya Tele byggiloyvið til telestøðina á matr. Nr. 474a, samb. viðløgdu tekning og samb. Tekningin frá Teknisku deild dagfest og at Føroya Tele ognar sær neyðugt grundstykki til telestøðina frá kommununi.

Avgerð: Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 119/2010 Jarðarmál.**
J. nr. 2007-0048-0020

Í umsókn dagf. 21.06.2010 søkir Haldur Vang um at fáa eitt uppískoytisstykki til grundstykki á matr. nr. 665d.
Søkt verður um eitt uppískoytisstykki sum er 13-14 metur oman og niðan (eystur og vestur) og uml. 12 metur fram við vegnum, (suður og norð).
Viðløgd er kort yvir uppískoytisstykkið.
Tekniska deild hevur hugt eftir umsóknini og gjørt kort yvir uppískoytisstykkið, suður úr grundstykkinum matr. nr. 665d , suður móti sparkivøllinum ið er 173 m2 til støddar.

Tekniska nevnd mælir til at játta Haldur Vang nýtslurætt til eitt stykki sunnan fyri grundstykki, sum er 6 metur fram við vegnum og 7 metur eystur og vestur.
Tá verður nøktandi øki eftir, millum sparkivøllin og húsini hjá Haldur Vang.
Henda avgerð er tikin við atlitið til sparkivøllin, og at møguleiki eisini skal verða at gera spæliplássá avlagda fríøkinum, men sum tó ikki skal koma ov nær stykkinum hjá Haldur Vang.

Avgerð: Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 120/2010 Byggimál.**
J. nr. 2010-0042-0276
Ingemar Højgaard Toftir søkir um byggiloyvi til útbygning í kjallarahæddini.

Tekniska nevnd mælir til at játta Ingemar Højgaard loyvi til ætlaðu uppíbygning samb. innsendu tekning.

Avgerð: Tilmælið hjá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 121/2010 Fíggjarmál.**
(Mál nr. 102/2010 Fíggjarmál., fekk fyrstu viðgerð 28.06.2010)

Fíggjarnevndin skal viðgerða og endurskoðað fíggjarætlanina fyri 2010.
Um broytingar skulu gerðast, skal nevndin koma við tilmælið til bygdaráðið.

Fíggjarnevndin hevði fund 18.06.10. har hon gjøgnumgekk allar konti.

Niðanfyri eru høðustølini

Fíggjarnevndin mælir til hesar broytingar.

Fíggjarætlan aftaná broytingar rakstur:

| | Rakstur | Íløgur |
|---|---|---|
| §1 Kommunal fyrisiting | 3.414.132 | 0 |
| §2 Almanna- og heilsumál | 3.843.667 | 215.000 |
| §3 Børn og ung | 6.999.766 | 400.000 |
| §4 Undirvísing | 3.128.690 | 405.000 |
| §5 Mentan og frítíð | 2.056.279 | 0 |
| §6 Teknisk mál | 2.829.100 | 824.000 |
| §7 Kommunal virki | 2.648.326 | 270.000 |
| Í alt | 24.919.960 | 2.114.000 |
| | | |
| Rakstur og íløgur | 27.033.960 | |
| | | |
| Rentustuðul | 1.070.000 | |
| Fas | 5.000 | |
| Rentuútreiðslur | 1.853.287 | |
| Rentuinntøkur | -20.000 | |
| Kommunuskattur | -31.017.089 | |
| Felagsskattur | -500.000 | |
| Kapitaleftirlønirq | -100.000 | |
| Aðrar inntøkur/útreiðslur | 56.226 | |
| Afturgjald av skuld | 1.615.713 | |
| Úrslit | -2.902 | |

Rakstur hækkar við tkr. 113 og íløgurnar við tkr. 265 í alt tkr. 378. Hetta verður fíggjað við, at ov nógv var avsett til rentustuðul, Fas og Rentuútreiðslur í alt tkr. 355 Munurin á tkr. 23 fer av úrslitinum.

Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

2 viðgerð av broytingunum í verandi fíggjarætlan, sum vóru samtyktar á seinasta fundi.

Avgerð: Tilmælið frá Fíggjarnevndin var einmælt samtykt við 2 viðgerð.